## DAGSINS MEINING

### Sansar nú at?

Okkurt er við at henda við almenna og privata búskapinum. Eftir at búskaparliga framgongdin hevur verið sera stór og nógv ferð hevur verið á búskapinum, eru nú tekin um, at gongdin er við at venda tann skeiva vegin. Fyrstu tekinini komu longu í fjør, tá fíggjarnevndarformaðurin tók fíggjarmálaráðharran av ræði og minkaði hansara fíggjarlóg munandi. Almenni búskapurin kom tá í ta støðu, at fyrst vórðu tær 366 blokkamilliónirnar skornar burtur, samstundis sum fíggjarlógaruppskotið hjá Karsten Hansen var skert. Hetta hevur ivaleyst hava sterka ávirkan á almenna og privata búskapin.

Nú er so nýggi búskaparligi veruleikin av álvara við at ganga upp fyri landsstýrinum. Í Degi og Viku týskvøldið boðaðu fíggjarnevndarformaður og fíggjarmálaráðharri frá, at nú koma skerjingarnar. Komandi fíggjarlóg fer at hava hall og tí má skerjast. Hetta hendir samstundis sum báðir partar vissa okkum um, at tað framvegis gongur væl – bara ikki so væl, sum tað hevur gingið. So verður sum vanligt tikið til tey ráð at skera har tað nívir mest t.v.s. at spara á almannaøkinum. Nú skulu menningartarnað, gomul og óhjálpin, ið hava stóran tørv á heimarøkt gjalda fyri tann búskaparpolitikk, ið m.a. merkti eina minking av blokkinum uppá 366 milliónir og skattalættar til tey vælbjargaðu.

Hetta hendir alt meðan menn leggja ætlanir um fleiri yvirtøkur og enn minni blokk. Hetta hongur ikki heilt saman búskaparliga uttan so, at almenna virksemið verður munandi skert. Hetta merkir so aftur, at vandi er fyri, at somu bólkar, tey veikastu, skulu rinda fyri gildið. Hetta er spell, tí ásannast má, at nógv gott er hent hesi seinastu árini, og framgongdin í samfelagnum hevur verið stor. Víst hevur hetta mest verið fiskaprísum og fiskastovnum fyri at takka. Men spell er kortini, at tað nú fer at ganga hinvegin og at teir ráðandi sjálvir tykjast skúgva undir skeivu gongdina.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sparingarnar sum forsvunnu: Øravík-Hov tunnilin/Samferðsluhavn

**Regin Hammer**

Fleiri løgtingsmenn hava postulerað at framskundan av Øravík-Hov verkætlanini fer at føra til sparingar á samferðsluhavnini uppá 45 mió. kr. Við at hyggja nærri at tølunum sæst at hesar sparingar eru ikki veruligar.

Nú hava limir í fleiri politiskum flokkum, og fleiri løgtingsmenn í eitt longri tíðarskeið verið frammi og útbasunerað at sparingar á 45 mió. kr. eru at vinna, bert ein tunnil verður gjørdur millum Øravík og Hov sum skjótast. Hetta er sagt bæði í útvarpi, bløðunum og í sjálvum álitinum frá Løgtingsins Vinnunevnd.

Talan skal vera um tvær sparingar. a) Tunnilin sum NCC skjýtur upp at gera í staðin fyri tann sum Landsverkfrøðingurin hugsar sær viðførir eina sparing uppá 30 mió. kr. b) Harumframt sigast 15 mió. kr vera at spara við at brúka grót úr tunlinum til samferðsluhavnina. Ergo 45 mió. kr.!

Latið okkum tó nú hyggja nærri at teimum omanfyri nevndu 45 milliónunum, sum Føroya Fólk fer at fáa tilgóðar av at frammskunda Øravík-Hov tunnilin.

Sparing a) Tær fyrstu 30 milliónirnar er sparing sum kemst av at gjørdur verður ein annar tunnil enn tann sum Landsverkfrøðingurin upprunaliga hugsaði sær. Tískil hevur hendan sparing onki við samferðsluhavnina at gera, men kann hendan sparing fremjast sjálvt um ongin samferðsluhavn so varð gjørd. Hendan sparing kann tí ikki tilroknast frammskundanini av Øravík-Hov tunlinum.

Sparing b) 15 mió. kr. sigast vera at spara við at nýta grót úr Øravík-Hov tunlinum, tí alternativið vildi verið at keypt grót úr grótbroti til samferðsluhavnina. Hinvegin hevur einki verið nevnt um, at um tunnilin ikki hevði kunnað selt grót til samferðsluhavnina, so hevði tunnilin kunnað selt grótið til onkra aðra verkætlan í oynni ella í versta føri kundi tunnilin selt grótið til grótbrotið sum so kundi goymt grótið eina tíð. Tað spillist helst ikki av at liggja nøkur ár inntil ein vegur ella ein havn aftur skal gerast í oynni. Tapið av hesum vildi so verið tíðarvirðið av teimum 15 milliónunum, sum í t.d. 5 ár við 3% diskontering vildi verið uml. 2 mió. kr.

Sostatt sær út sum at sparingin uppá 45 mió. kr er vorðin ein sparing uppá umleið 2 mió. kr. Hetta er eisini ein sparing sum verd er at hava í huga, og sum eisini hjálpir landshúsarhaldinum. Tí er møguliga eisini eitt sindur av haldi í tí sum ávísir tingmenn føra framm, nevniliga at ein fyrimunur kann fáast við at frammskunda Øravík-Hov tunnilin. Men um hugt verður at støddini á teimum so er ein upphædd uppá 2 mió. kr. sera lítil í mun til óvissurnar í einari samlaðari verkætlan uppá 152 mió. kr. (92 mió. kr. til tunnilsgerð við uppskotinum frá NCC + 60 mió. kr. til samferðsluhavn). Harumframt stóð mikudagin fyri Páskir at lesa í bløðunum, at NCC gjørdi vart við at tølini 92 mió fyri tunnilin og sparingina uppá 15 mió. kr. til havnagerð bert vóru leysligar metingar, og als ikki bygdar á veruligar kostnaðarmetingar ella tilboð. Hetta ger bert óvissuna um tølini enn størri.

Løgtingsmenn hava fingið høga løn fyri starv sítt tí nú skuldi tað vera at rokna sum minst hálvtíðarstarv. Tískil var argumenterað fyri at nú skuldu størri krøv setast til tingarbeiðið. Tó eru eftir hesum at døma ikki stórvegis tekin um hesa størri dygd í tingarbeiðinum at hóma. Tingfólk sleinga pástandir um risasparingar út, sum eru tiknir meiri ella minni úr leysum lofti, bert fyri at fáa ávísar regionalpolitiskar ætlanir gjøgnumtrumfaðar. Eitt er, at beinleiðis skeivleikar verða framsagdir, tað slepst kanska ikki undan, men tað løgna við hesum er, at slíkir pástandir fáa loyvi til at standa eftir sum tann endaligi sannleikin uttan at nakar av hinum tingmonnunum ger vart við skeivleikan í tølunum.

Nú er málið um samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði so avgreitt í tinginum og endaliga avgerðin varð at grótið í mest møguligan mun skuldi takast úr Øravík-Hov tunlinum. Møguliga var hetta eisini besta loysnin, men sera harmiligt er, at tingmenn eru so kreativir tá veldst um at trýsta sítt ígjøgnum at tað gongur útyvir trúvirði Løgtingsins.

# Fyrireika seg til Vestanstevnuna

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagin 6. juli ber til at keypa sær stásið til Vestanstevnuna. Stásið kundi eitt nú verið skógvar og klæði til vaksin, børn og barnkonur. Eisini ber til at fáa hol í oyrað og at keypa sær smartar linsur til eyguni í nógvum spennandi litum. Til ber eisini at fáa settar lokkar í hárið, lokkar í ymsum litum, soleiðis at hárið verður eitt litspæl.

Eisini verður café, har til ber at keypa kaffi, te, kakur, pylsur við breyði og sodavatn.

Tað eru handlarnir Sørvágs Skósøla, Sørvágs Ursmiðja, Hjá Sannu, Klædnabúðin í Sandavái, Sirri, Events og Zig Zag, ið skipa fyri.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


# ítróttur

Nr. 123 • hósdagur • 4. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

**Sosialurin á Guernsey:**



*Ingrid Bjarnastein, blaðkvinna*



*Álvur Haraldsen, myndamaður*



*Jákup Mørk, blaðmaður*

# Stjørnuskot millum skjúttarnar

**Annika Vang tók bæði seg sjálva og onnur á bóli, tá hon so ruddiliga setti persónligt met í recurve-skjótingini**

BOGASKJÓTING
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Hóast føroyska liðið - sum tað framgongur aðrastaðni – misti gullið í bogaskjótingini týsdagin, var so væl og virðiliga rúm fyri smílum á liðnum.

Eingin av hesum mundi tó hava størri smíl enn Annika Vang. Sum vit skrivaðu í mikudagsblaðnum, so hevði hon á 70 metrunum betra persónliga metið við ikki færri enn 50 stigum, og tó at hon seinni datt av bronsuplássinum, so var talan so ruddiliga um persónligt met hjá bert 14 ára gamla skjúttanum.

At hon hevur tað í blóðinum, er einki at ivast í. Foreldrini bæði, Schandorff og Sigrid, hava gjøgnum árinin vunnið hópatals gullmerki heim til Føroya. Bæði hvør sær og í felag. Nú skal mann nokk ansa sær at rópa húskið fyri tað, sum danir nevna »en skydeglad familje«, men tað munnu í øllum førum fara nakað væl av pílum gjøgnum luftina millum ár og dag. Og

Tá alt varð talt saman um hálvgum fýra tíðina, stóðu ikki færri enn 954 stig á kontini, og tó at hon ikki hevði staðið seg eins væl á 50 metrunum, so var frøin stor. Eftir at hon stórleypandi var komin yvir at hálsfevna pápan og siga frá, hvussu seinasta umfarið hevði skorist, fingu vit orðið á hana.

- Nú havi eg ikki endaliga talið enn, men á 70 og 60 í gjár var í øllum førum persónligt met. 50 meturin var á leið tað sama, sum eg havi skotið heima, og 30 meturin havi eg ikki endaliga fingið talið á enn, men samanlagt man hetta í øllum førum vera tað besta, sum eg havi skotið.

Og at fáa slíkar seriur sum hesar á oyggjaleikunum, er tað ikki nakað heilt fyri seg?

- Jú, hetta hevur verið stuttligt. Virkeliga stuttligt. Og so havi eg eisini fingið nakrar royndir, sum heilt víst kunnu koma mær til góðar seinni. Vónandi um tvey ár, tá man aftur er á oyggjaleikum, segði ein fegin Annika at enda.



*Annika Vang var føroyski skjúttin við størsta frambrotinum í fyrstu kappingini, og spennandi verður at vita, hvat hon megnar í head-to-head kappingini miku- og hósdagin*

# Bronsa til Boga

**Í einum sera spennandi endaspurti eydnaðist Boga Lenvig at renna seg til bronsu á 5.000 metrum týsdagin**

RENNING
*Jákup*

**Guernsey:** Tað vóru bert 14/100 part sekund, sum skilti Boga Lenvig og gotlendingin á fjórða plássinum, tá 5.000 metra renningin hjá monnum var á skránni týsdagin.

- Ja, hatta var ein spennandi spurtur. Tá vit fóru um seinasta hornið, var eg framvegis nummar fýra, men eg megnaði so at spurta meg fram á bronsuna, men tað var so ikki meira enn akkurát, helt Bogi, tá vit hittu hann á orði eftir renningina.

Og talan var alla tíðina um eina spennandi kapping. Kim Godtfredsen úr Grønlandi tók gullið við tíðini 15.00,62, men frá silvurinum og til fjórða plássið var bert eitt sekund.

Sjálvur var Bogi so hampuliga væl nøgdur um bronsuna, men hann hevði tó havt vónir um meira.

- Eg fór sjálvandi eftir gullinum. Men samstundis visti eg, at skuldi tað eydnast, so mátti alt rigga perfekt, men eg eri ikki ónøgdur. Í ár havi eg satsa meira upp á teir styttru teinarnar, so hetta er bara aðru ferð í ár, at eg renni 5.000 metrar. Og samstundis skar eg 23 sekund av persónliga metinum, har venjarin hjá mær annars hevði roknað við einum 10-15 sekundum, so eg fái illa verið ónøgdur, helt hann.

Annars var talan um ein rættiliga skjótan 5.000 metur, tó at hesin ikki tók metið fyri teinin, sum var sett í 1991. Men í mun til tíðina á Isle of Man, var nógv ferð á. Fýra teir fremstu rennararnir vóru soleiðis væl undir vinnandi tíðini frá teirri ferðini.

Umframt 5.000 metrarnar skal Bogi eisini taka lut í 1.500 metrum, sum verður hósdagin og so hálvum marathon, sum verður fríggjadagin. Fyrst skuldu tey í frælsa ítróttinum tó njóta mikudagin, sum var frídagur, áðrenn hósdagurin byrjar við heiðursmerkjahandanini fyri 5.000 metrar.